

*John Johannesen var leingi at finna við eitt borð í Norðurlandahúsinum, men hvarv bráddliga og setti kós móti Hotel Føroyum, har hann ætlaði sær at skriva seg inn, tí hann helt seg vera vrakaðan. Hann kom tó ongantíð inn á kamarið, tí í forhøllini ynskti resepsjónisturin tillukku við valinum og John fekk soleiðis at vita, at hann kortini hevði endurvunnið sessin*



*Fólkaflokkurin fekk betri úrslit, enn veljarakanningarnar vístu. Jørgen Niclasen, floksformaðuri, var sjálvandi ovurfegin*



*Ein spent Annika H. Olsen úr Fólkaflokkinum fekk rættiliga skjótt ábendingar um, at hon varð vald*



*Magni Laksáfoss, landsstýrismaður, gjørdist toppskorari í Sambandsflokkinum við 979 atkvøðum. Her í práti við Grækaris Djurhuus Magnussen, úr Kringvarpinum*